# Skúlin verður á Tvøroyri



*Landsstýrismaðurin við undirvísingar- og mentamálum hevur tikið eina avgerð, og henda verður ikki broytt, so leingi hann situr í landsstýrissessinum*

DIA MIDJORD

Teir eru rúkandi ósamdir - Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen - hóast teir røkja sama starv og umboða sama flokk í landsstýrinum.

Feskasta dømið er, at Signar legði Almanna- og heilsuskúlan í Havn, meðan hin hevur lagt sama skúla á Tvøroyri.

Tí spyrja vit nýggja landsstýrismannin, hví hann velir at ganga beint ímóti avgerðini hjá undanfarna landsstýrismanni.

– Tað er av tí einføldu orsøk, at tað eri eg sum taki avgerðirnar í dag og eingin annar, sigur nýggi landsstýrismaðurin og leggur aftrat.

– Tú kanst stóla uppá, at tann dagin eg ikki sleppi at taka egnar avgerðir, tá siti eg ikki longur í hesum sessi.

**Styrkja útjaðaran**

Tórbjørn Jacobsen vísir á, at hansara avgerð um at leggja skúlan á Tvøroyri, er í tráð við endamálsorðingina í samgonguskjalinum, at útjaðarin skal styrkjast.

– Tá tað kom fram í løgmansrøðuni, at eingin avgerð var tikin um, hvar skúlin skuldi liggja, valdi eg eina loysn út frá samgonguskjalinum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Men Signar á Brúnni sigur, at tú bert rangar upplýsingar, tí boð vóru givin frá honum, hvar skúlin skuldi liggja.

– Eg havi so ikki sæð tað, og eg segði eisini undir viðgerðini av løgmansrøðuni, at mær vitandi vóru eingi onnur boð givin, enn tað sum stendur í røðuni, sigur Tórbjørn Jacobsen.

**Bert ráðgevandi**

Vit spyrja nýggja landsstýrismannin, hví hann ikki á sama hátt sum Signar á Brúnni fylgir tilmælinum, sum nevndin kom til.

– Henda nevndin við embætismonnum og serfrøðingum hevur til uppgávu at finna útav, hvørjar útbúgvingar eru neyðugar og hvussu tær skulu skipast. Men nevndin skal ikki gera av, hvar skúlin skal liggja, sigur Tórbjørn.

– Plaseringin av skúlanum er ein politiskur spurningur, og tað eri eg, sum eri valdur at taka endaligu avgerð á hesum økinum, leggur hann aftrat.

**Fleiri enn eitt sjúkrahús**

Tórbjørn Jacobsen sigur seg ikki skilja, at ein plasering av einum skúla, skal hava so nógv at siga og kanska gerast eitt poltiskt klandrimál.

– Tað má bera til at flyta skúlar, ið enn ikki eru stovnsettir, út um Havnina. Tí annars er alt tos um økismenning tað reina tvætl, sigur nýggi landsstýrismaðurin.

Hann vísir á, at frægasta loysnin er at leggja skúlan uttan fyri miðstaðarøkið.

– Flestu argumentini hava verið, at skúlin má liggja upp at einum sjúkrahúsi, men hví skal tað endiliga vera Landssjúkrahúsið. Á Tvøroyri er eisini eitt sjúkrahús, sigur Tórbjørn Jacobsen.

**Signar tvætlar**

Sambært skrivi í bløðunum førir Signar á Brúnni fram, at nýggi landsstýrismaðurin eisini hevur avgjørt, at Lista- og handverksskúlin skal verða í Sandoynni.

– Hetta er ein misskiljing úr einum enda í annan. Signar blandar alt saman. Lista og handverksskúlin í Klaksvík hevur einki við henda nýggja skúlan at gera. Talan er um ein nýggjan skúla til tónlist og leiklist, sum eg vísti til, sigur Tórbjørn Jacobsen.



# Sjálvstýrismálið má bara loysast

*Um tað verður loysing ella samband, so tekur Jóannes Eidesgaard undir við hesum. – Tað týdningarmikla er at koma á mál, sigur hann*

DIA MIDJORD

Málið um sjálvstýrið er farið við so nógvari orku seinastu tíðina, at ein ella onnur loysn má og skal finnast.

– Nú má røkka ella støkka, tí vit kunnu ikki brúka meiri tíð og orku upp á hettar málið, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

**Liggur ímillum**

Í viðmerkingunum til løgmansrøðuna sigur Jóannes Eidesgaard, at loysnin er hvørki fullveldi ella ein varislig broyting av heimastýrislógini. Loysnin liggur eitt stað ímillum.

– Vit skulu eftir tí loysnini, sum kann fáa Føroya fólk við, sigur hann.

Vit spyrja, um tað er líkamikið, hvør smiðurin er?

– Tað eigur ikki at telja fyri nakran flokk. Vit mugu finna eina loysn, óansæð hvør fær æruna av hesum, sigur Jóannes Eidesgaard.



# Sáttmálaloysi valdar millum bilverkstaðir og Tryggingarfeløgini

*Tryggingarfeløgini vilja sleppa av við serlig ískoyti til eykalutir og lakering. Stóru bilmerkjaforhandlararnir vilja varðveita ískoyti. Fundur verður millum partarnar í dag*

Niclas Johannesen

– Vit hava gjørt sáttmála við summar verkstaðir. Men enn mangla allir teir stóru.

Hetta sigur Høgni í Stórustovu, deildar stjóri á skaðadeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, í sambandi við sáttmálaloysi, sum valdar millum stóru bilmerkjaforhandlararnar og Tryggingarfeløgini. Gamli sáttmálin gekk út 1. august.

**Broytt mannagongd**

Sáttmálaloysið er komið í kjalarvørrinum á broyttari mannagongd í skaðaumvælingini. Áður hevur ein kollektivur sáttmáli verið gjørdur millum Tryggingarfelagið og Bilforhandlarafelagið vegna allar bilverkstaðir. Bilverkstaðirnir hava síðani verið bólkaðir í fýra bólkar, har hvør bólkur hevur fingið fast tímagjald fyri umvælingararbeiðið.

Kappingarráðið hevur mótmælt hesi mannagongd og sagt, at hetta gongur ikki. Sáttmáli skal gerast við hvønn einstakan bilverkstaðin.

Higartil hava summir bilverkstaðirnir fingið serligt ískoyti fyri eykalutir og lakering, og sum skilst, so er tað júst her, ið størsta ósemjan valdar. Togast hevur verið aftur og fram seinastu tríggjar mánaðirnar. Tryggingarfeløgini hava spælt út við, at ískoytini skulu falla burtur, og sum skilst so eru bilmerkjaforhandlararnir ikki so glaðir fyri henda tankan.

Frá tryggingarfeløgunum hevur verið víst til eina altjóða skipan, ið rópast autotax. Sum skilst kemur ein danskari til Føroya, at kunna um hesa skipan á fundi, sum verður millum partarnar ímorgin.



*Vandi er fyri, at ósamsvar verður millum kostnaðarmetingina hjá Tryggingarfeløgunum og bilverkstaðum av skaðum, so leingi ongin sáttmáli er millum partarnar*

# Luft til sølu

*Amerikanska felagið Niagra hevur júst selt reina luft fyri 10 milliónir dollarar til størsta dálkaran í Kanada - orkufelagið Suncor*

NICLAS JOHANNESEN



Nú sleppur kanadiska orkufelagið Suncor at dálka luftina upp aftur meira. Gongur væl, kann felagið økja dálkingina upp til 70 prosent komandi ár. Og eigararnir hava góðar vónir.

Handilin hevur elvt til yvirskriftir og innsløg í Norðuramerika.

**Lógir herdar**

Soleiðis hongur sølan av luft saman:

Seinastu árini eru lógirnar um, hvussu nógv einstøku virkini sleppa at dálka herdar. Skipanin gongur í stuttum út upp á, at størstu dálkingarframleiðarar – orkufeløg – fáa eina heildarkvotu fyri, hvussu nógv eitur kann sproytast út í atmosferuna árliga.

Og líka sum føroysk reiðarí kunnu selja og keypa fiskidagar frá hvørjum øðrum, soleiðis kunnu amerikansk feløg nú selja og keypa luft.

Hóast kritikkurin móti hesi skipan er harður, so eru tað fleiri, ið verja hana. Víst verður til, at Niagra fer at brúka meginpartin av teimum 10 mió. dollarar, fyritøkan fær fyri at selja luft, at menna tøkni, sum í longdini fer at minka um dálkingina. Ætlanin er síðani at selja teirra tøkni til onnur feløg, sum fyrr ella seinni røkka dálkaða luftloftinum.

Eygleiðarar siga, Niagra er í eini góðari ringrás. Hjá Suncor er verri.

**Illavorðnir**

Profitturin ivaleyst at økjast komandi árið hjá Suncor. Men talan kann gerast um stokkuta gleði.

Tí meðan skitni roykurin blæsur sum ongantíð áður frá túsundtals skorsteinunum hjá Suncor, dalar teirra kredivirði. Í hárfína spælinum millum profitt og moral, eru Suncor við milliard keypinum av reinari luft, sum skal dálkast, komnir undir bólkin »illavorðnir dreingir«. Hetta fer at síggjast aftur a partabrævamarknaðinum, meta eygleiðarar.

Suncor fer at tjena meira. Men verður minni vert. Felagið má taka annað skinn um bak og gera íløgur í minni dálkandi framleiðslutól, meta eygleiðarar.


**SÍF stevnan 2000**



| | | |
|---|---|---|
| **Fríggjadag** | Kl. 21.00-01.00 | Fiskikapping á vatninum |
| | Kl. 19.30-22.30 | Barnadiskotek í SÍF-húsinum |
| | Kl. 23.00 | Diskotek fyri vaksin í SÍF-húsinum |
| | **Fótbóltur** | |
| **Leygardag** | Kl. 09.30 | Smápiltar SÍFb-MBb |
| | Kl. 09.30 | Pinkur SÍF-SÍ |
| | Kl. 10.15 | Smápiltar SÌFa-Mba |
| | Kl. 10.15 | Gentur 10-12 ár SÍF-SÍ |
| | Kl. 11.00 | Piltar SÍF-GÍ |
| | Kl. 11.00 | Smágentur SÍF-SÍ |
| | Kl. 12.00 | Smádrongir SÍF-SÍ |
| | **Anna› undirhald** | |
| | Kl. 10.00-12.00 | Barnarógving í ánni |
| | Kl. 13.00 | Súkklukapping fyri børn |
| | Kl. 14.00-20.00 | Hoppiborg |
| | Kl. 14.30 | Hondbóltur í høllini á Giljanesi *A-Landsli›i›-VÍF (menn)* |
| | Kl. 16.00 | Kappró›ur *Steypahandan og matur til kappró›rarfólkini ver›ur í SÍF-húsinum aftaná kappró›urin* |
| | Kl. 16.00-18.00 | Barnarógving í ánni |
| | Kl. 17.00 | Matsøla í SÍF-húsinum |
| | Kl. 18.00 | Rennikapping fyri børn |
| | Kl. 20.00 | Hugnaløta á sandinum v/ Felagssangi, báli, fyrilestri um løgmanstí›ina í Sandavági (Jógvan Ravnsfjall grei›ur frá) Eisini ver›ur mótas‡ning vi› SIRRI og gott undirhald. Møguleiki ver›ur at keypa grilla›an laks og anna› til matna. Um ikki vi›rar, ver›ur tiltaki› í SÍF-húsinum |
| | Kl. 23.00 | Dansur Ólavur Øster, Pauli og vinmenn spæla |
| **Sunnudag** | Kl. 19.00 | Bingo í SÍF-húsinum |

***Vælkomin á SÍF stevnu***

**SÍF stevnan 2000**